gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Liðskiparin hevur stórar ætlanir

*Liðskiparin á flogbóltslandsliðnum hjá monnum, sum her sæst í dysti fyri Fram, hevur góðar vónir, nú Oyggjaleikirnir standa fyri framman*



**Rúni Weihe er bara 20 ára gamal, men er kortini liðskipari á manslandsliðnum í flogbólti. Hann hevur ætlanir um at royna seg uttanlands og tað er ikki óhugsandi, at tað verður í Suðuramerika, men í fyrsta umfari eru tað Oyggjaleikirnir, sum standa fyri durum og triðjaplássið skal verjast, sigur Rúni**

FLOGBÓLTUR

Manslandsliðið í flogbólti, sum skal til Oyggjaleikirnar á Isle of Man, er eitt rættiliga ungt lið. Gamaní er stamman samansett av leikarum við drúgvum royndum, men tað eru teir ungu leikararnir, sum síggjast best.

Men hóast leikararnir eru ungir eru teir ikki blankir allir samlir, minni enn so. Ein, sum í hvussu er ikki kann teljast millum teir óroyndu, hóast hann er ungur, er Rúni Weihe. Hóast hann bara er 20 ára gamal hevur hann leikt fleiri enn 20 landsdystir, og nú hann fer til Oyggjaleikir, er tað sum liðskipari valdur av liðfeløgunum.

## Stór framtíð

Tað er ein byrða at leggja á herðarnar á einum so ungum leikara, men hann smæðist ikki burtur. Í so máta hevur hann breiðar herðar, tí ungi havnarmaðurin hevur leikt flogbólt síðani hann var tólv ára gamal, og tí veit hann, hvat spælið gongur út uppá.

Spurdur, hvørjar vónir hann hevur fyri kappingina á Man, sigur Rúni, at málið altíð eigur at vera at vinna kappingina, men at tað kann fara at gerast torført, tí bólkurin, sum føroyingar eru endaðir í, er harður. Knallharður.

- Saaremaa hevur havt eitt sera gott lið seinnu árini og stillar Cayman Island upp við sterkasta liðið, so hevur eingin nakran kjans móti teimum. Teirra sterkasta lið er í einum flokki fyri seg. Seinast møttu teir við nøkrum góðum leikarum og onkrum minni góðum, og tí endaðu teir á sjeynda plássi, greiðir Rúni frá.

Hóast Rúni heldur, at føroyska liðið, sum hesaferð fer til Oyggjaleikir ikki er so sterkt sum undanfarin ár, so heldur hann at tað eru góðir framtíðarmøguleikar í liðnum. Ungu leikararnir skulu haldast til, og helst einasti máti at gera tað upp á er við at lata teir sleppa at royna seg til slíkar kappingar.

## Ætlar sær av landinum

Tey, sum kenna Rúna og spæl hansara vita, at hann ofta hevur verið nógv skaddur, og hann váttar eisini, at so hevur verið. Men seinastu tvey árini hevur gingið betri og orsøkin, sigur Rúni, er at hann hevur vant stabila venjing. — Eg haldi, at venjingini hini árini hevur verið ov ógvuslig og skiftandi, og tað hevur givið mær trupulleikar. Tvey tey seinastu árini hava vit vant stabila venjing og tað hevur givið kroppinum tíð at koma seg, greiðir Rúni frá.

Hann leggur afturat, at venjarin á landsliðnum — hann er eisini venjari í felagnum hjá Rúna — eigur størstu æruna av, at hann er sloppin so rímuliga snikkaleysur seinnu bæði árini. Men her fyri fór ryggurin kortini heilt av lagi.

- Eg havi fingið at vita, at muskulaturin í rygginum helst er ovbyrjaður og tí knýtti hann seg allur sum hann var. Nú havi eg gingið til viðgerð nakrar ferðir og tað sær út til at tað fer at koma upp á pláss, sigur Rúni.

Sum sagt er Rúni ungur maður og sum hjá so mongum teirra, liggur hugurin til at fara av landinum at royna seg. Heldur ikki í so máta er Rúni nakað undantak. Hann spælir næsta árið í Fram, men so verður leiðin løgd av landinum.

- Eg ætli at royna meg uttanlands, men hvar tað verður er sjálvandi tengt at, hvar í verðini gentan og eg enda. Vit ætla okkum til Suðuramerika at arbeiða og verður tað til nakað, so fari eg at royna meg í Suðuramerika. Tað er ein rimmar avbjóðing tí flogbóltur er næststørsta ítróttargreinin aftaná flogbóltin, so tann møguleikin má ikki sleppa óroyndur framvið, greiðir Rúni frá.

## Eftir heiðusmerkjum

Um tað verður til tað, avhongur tó nógv av, um unnusta hansara kemur víðari við sínum ætlanum í Suðuramerika. Ger hon ikki tað fara tey bæði til Danmarkar og so verður tað danska kappingin, sum stendur fyri stavn. Men tað er eisini spennandi heldur Rúni.

- Mær stendur í boði at spæla við Frederiksberg Volley, har Sigmundur av Teigum leikar frammanundan. Jesper Brix, sum vandi landsliðið fyri tveimum árum síðani, er venjari har, so tað ljóðar bara heilt spennandi, sigur Rúni.

Men áðrenn tað standa Oyggjaleikirnir fyri stavn og hóast Rúni ætlar sær heiðursmerki heimaftur við sær, so er hann so mikið realistiskur, at hann veit, at stórar forðingar liggja á vegnum.

- Málið er at fáa heiðursmerki og fáa vit tað eiga vit at vera nøgdir, sigur hann at enda.

gult23 cyan23 magenta23 svart23



Atlanticon Atlanticon

## Spennandi starv
### innan umsiting

Nú verður farið undir fyrstu oljuboringarnar í leitifasuni. Tey 12 oljufeløgini, sum hava fingið loyvi at leita eftir olju í Føroyum, hava stovnað eitt vinnugreinafelag, "Føroya Oljuídnaðarbólkur", stytt til FOÍB. Atlanticon hevur umsitingina hjá FOÍB um hendi. Tann, sum verður settur í starvið, fer at arbeiða innan FOÍB umsitingina. Viðkomandi kann eisini koma at arbeiða við øðrum uppgávum hjá Atlanticon.

**Uppgávur**
- avtala og fyrireika fundir og seminar
- arbeiða innan kunningartænastu
- journalisera
- vera samskipari tá ymiskt tilfar skal gerast
- annað skriviarbeiði hjá felagnum

**Førleiki**
- duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- duga væl at skriva føroyskt
- duga at tosa og skriva enskt
- hava útbúgving sum akademiøkonomur, Sprøk, HD e.l. ella hava drúgvar royndir innan umsiting

**Setanartreytir**
Tann, ið settur verður, kann byrja 1. august ella skjótast gjørligt eftir henda dag.
Løn eftir avtalu.
Nærri upplýsingar fáast frá Janet Fríðu Johannesen ella Hilmar Eliasen, tel 319685.

Umsóknin skal vera Atlanticon í hendi í seinasta lagi 23. juli 2001.
Umsóknin verður at senda til :

Atlanticon
Bryggjubakki 4, tel 319685, fax 319185
Postboks 263, FO-110 Tórshavn
e-mail: atlanticon@atlanticon.fo
www.atlanticon.fo

Atlanticon Atlanticon Atlanticon Atlanticon
Team 85 • 316511

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Transocean framløga

Felagið TRANSOCEAN, sum eigur boripallin Sovereign Explorer, sum Statoil og Amerada Hess hava leigað til at bora eftir olju í summar, kemur til Føroya at vitja hósdagin.

Í sambandi við vitjanina fer Asbjørn Olsen, marknaðarstjóri hjá Transocean, at hava framløgu um felagið, arbeiði hjá felagnum í Føroyum í dag og um arbeiði í framtíðini, um olja verður funnin.

Oljuvinnufelagið, í samstarvi við Atlantic Supply Base, bjóðar í hesum sambandi øllum virkjum við áhuga í oljuvinnuni, og myndugleikum, sum hava við oljuvinnuna at gera, til framløguna.

Framløgan verður:

**fríggjadagin 6. juli klokkan 16:00 í Glyvra skúla**

Eftir framløguna verður høvi hjá luttakandi at síggja Atlantic Supply Base.

Boðast skal frá luttøku **í seinasta lagi hósdagin 5. juli** hjá Vinnuhúsinum, telefon 311864

**Oljuvinnufelagið**
**Vinnuhúsið**

## Starvsfólk til kaffistovuna í Føroyahúsinum

Kaffistovan í Føroyahúsinum er miðdepilin í húsinum, hagar fólk koma at hitta onnur, á fund, at lesa bløð, lána bøkur og at keypa sær ein drekkamunn við einum góðum bita afturvið. Javnan eru eisini veitslur, brúdleyp og onnur tiltøk at taka sær av.

**Førleiki tín:**
Søkt verður eftir einum fólki, kvinna ella maður, sum serstakliga kann vera við til at skapa eina nýtímans, livandi og hugnaliga føroyska kaffistovu í Keypmannahavn. Tí er neyðugt at tú:

- hevur áhuga fyri vælferð og trivnað hjá gestunum
- er kreativ/ur, ágrýtin og fryntlig/ur
- er hugað/ur at samstarva við øðrum fólki og sjálvbodnum í húsinum
- kanst laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- dugir at orða teg í talu og skrivt á føroyskum og donskum eins og at fáast við tøl og tilboð
- dugir at keypa eins væl og at selja vørur og tænastur
- hevur hug og hegni til matgerð og borðreiðing

**Vit kunna bjóða tær:**
- spennandi og avbjóðandi starv, har tú kanst seta tín egna dám á arbeiðslag og umhvørvið
- eitt arbeiðspláss, har tú hittir nógvar landsmenn
- góð arbeiðskor og løn eftir førleika
- avtalu um frítíð og smáskeið

Upplýsingar um starvið kunna fáast hjá leiðaranum í húsinum. Umsókn verður send til Føroyahúsið í Keypmannahavn, Vesterbrogade 17A, 1620 København V. Umsóknarfreistin er 25. juli.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**

## NetCafé Orion

Í sambandi við at NetCafé Orion møguliga fer at keypa nýggjar teldur, verða núverandi teldur seldar fyri spott prísir.

Talan er um 12 teldur, sum verða seldar fyri 7.000,- pr. stk, skunda tær og ring um tú ætlar at ogna tær eina teldu fyri hendan spott prís.

**NetCafé Orion**
Tlf. 216676

## Heilsuhjálparafelag Føroya

Skrivstovan er stongd vegna summarferiu frá mánadegi 9. juli, opið verður aftur mánadagin tann 30. juli.

**Nevndin**

## Summarfrí

Sagt skal verða frá, at Almanna- og heilsumálastýrið er afturlatið vegna summarfrí í tíðarskeiðnum frá 9. juli til 27. juli 2001. Opið verður aftur sum vanligt mánadagin 30. juli 2001. Tó ber til at ringja á tlf. 30 40 50 millum kl. 9.00 og 15.00

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Eirargarður 2
100 Tórshavn

## Kollafjarðar skúli

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv við Kollafjarðar skúla at undirvísa fulla tíð skúlaárið 2001/2002.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1 til 27.4.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi á middegi mikudagin 11.07.2001.

**Kollafjarðar skúlanevnd**
v/ Arnbjørn Kristiansen
410 Kollafjørður



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

## Skaddur bilur til sølu

Vegna P/f Trygd selja vit henda BMW 525 tds, sum hann stendur, treytað av, at nøktandi boð verður givið.

Bilurin er frá 1993, hevur koyrt um 185.000 km.

Myndir síggjast á www.bilar.fo

**Úrvalsbilar Spf.** **tlf. 444943 og 217704**
Bakkavegur Fax 444638
530 Fuglafjørður Teldupost: bilar@bilar.fo